




## HAVNAR SØGA I og II – Framsýning í Müllers pakkhúsi

Fríggjadagin 1. oktober 2004 gevur Tórshavnar kommuna út bøkurnar Havnar søga I og II. Høvundar eru Jens Pauli Nolsøe og Kári Jespersen.

**Framsýning í Müllers pakkhúsi**
Í hesum sambandi skipar Tórshavnar kommuna saman við Tórshavnar Býarsavni og Føroya Fornminnissavni fyri áhugaverdari framsýning í Müllers pakkhúsi við myndum, kortum, skjølum og tekningum. Framsýningin letur upp fríggjadagin kl. 17.00 til 19.00.

Frá 2. oktober til 24. oktober verður framsýningin í Müllers pakkhúsi opin hvønn dag frá kl. 14.00 til 18.00. Ókeypis atgongd.

**Framsýning í Snarskivuni**
Eisini verður ein framsýning í Snarskivuni. Frá 30. september til 26. november hava Býarsavnið og Landsskjalasavnið framsýning um býarmenningina í tíðarskeiðinum frá 1856 til 1954.

Í Snarskivuni er opið gerandisdagar frá kl. 9.00 til 16.00, tó hósdag til kl. 18.00.




Fyrsta og onnur bók av Havnar søgu eru um tíðarskeiðið frá landnámi til 1816.

Havnar søga I er um frásagnir og samtíðarlýsingar av Havnini, fornfrøðiligar rannsóknir í gomlu Havnini, ting- og rættarviðurskifti, bóndagarðin Húsagarð og vinnur hjá havnarfólki, einahandilin fram til umleið 1790 og staðanøvn innan- og uttangarðs í Havnini.

Havnar søga II er um Vágsbotnshandilin 1768-1793, kongliga handilin frá umleið 1790 til 1816, skansaverkið, hospitals- og heilsuviðurskifti, kirkjurnar, skúlarnar í Havn, og hvussu Havnin veksur og mennist fram til umleið 1816.



# ítróttur

Nr. 187 • fríggjadagur • 1. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Tríggir málverjar úttiknir



*Umfram Jákup Mikkelsen hevur Henrik Larsen eisini sent boð eftir Bárði Johannesen, so tað verða tríggir málverjar við á komandi landsliðsferðini*

**Landsliðsvenjarin hevur givið Jákupi Mikkelsen longri freist at koma fyri seg í**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Eingin ivi er um, at Henrik Larsen ógvuliga fegin vil hava Jákup Mikkelsen við á landsliðsferðina til Kypros og Írlands. Trupulleikin er, at Jákup Mikkelsen er vøddaskaddur í lærinum. Jákup vandi eitt sindur við KÍ týskvøldið, men hann er ikki komin fyri seg aftur, og tað er framvegis opin spurningur, um hann fer at spæla við KÍ móti ÍF leygardagin.

Í fyrstu atløgu gjørdi venjarin av at bíða við úttøkuni av einum málverja afturat Jens Martin Knudsen. Nú hevur venjarin umframt Jákupi Mikkelsen eisini givið Bárði Johannesen, málverjanum hjá HB, boð til landsliðsferðina. Í hesum liggur, at Jákup fær nakrar dagar eyka at koma fyri seg í, áðrenn slagið fer at standa á Kypros leygardagin í næstu viku.

## Jógvan er leikbannaður



*Jógvan Arge verður ikki við, tá landsliðið skal spæla á Cypros og í Írlandi*

Tað verður ikki Jógvan Arge, sum fer at hoyrast í Útvarpinum, tá landsdystir verða leiktir á Cypros og í Írlandi í næstum.

Býráðsvalið stundar eisini til í Havn, og her er Jógvan sum kunnugt ein av kandidatunum á tjóðveldisflokkinum. Tað hevur so viðført, at Argemaðurin er leikbannaður hesaferð. Ístaðin verður útvarpsmanningin væntandi soleiðis, at Súni Merkistein verður einsamallur við mikrofonini á Cypros, meðan hann í Írlandi fer at fáa hjálp frá Hilmari Jan Hansen.

Hetta er bara næsta landsliðsferðin, at Jógvan ikki verður við mikrofonina, síðani Føroyar fóru at spæla undankappingardystir. Tá Føroyar á heysti 2001 leiktu útidyst móti Jugoslavia, sá Jógvan sær ikki umstøður at fara til tann dystin.





SELJARI SØKIST

Av tí at sølan av retail, catering og feskum vørum er í støðugari menning søkir P/F United Seafood eftir seljara.

United Seafood eigur 7 fiskavirkir og eru hesi spjødd um alt landið.

Felagið hevur drúgvar royndir við at hagreiða øll fiskasløg, serliga upsa, tosk, hýsu, svartkalva og kongafisk.

Vørurnar, ið virkaðar verða, eru á høgum góðskustigi og fevna um m.a. frystar vørur, saltaðar vørur, feskar vørur, catering vørur og retail vørur.

Uppgávurnar hjá seljaranum verða m.a.

- samstarv og samskifti við keyparar av vørunum
- samstarv um keyp av rávøru
- samstarv við søluleiðslu og virkisleiðarnar

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar

- relevanta útbúgving á passandi støði
- kunnleika til og royndir innan sølu av fiski
- kunnleika til framleiðslu á fiskavirkjum
- góðan málkunnleika
- góð samstarvs- og kommunkatiónsevni

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 25. oktober.

Um áhugi er fyri hesum starvi, kunna tygum seta tygum í samband við:

UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking
att: Símun P. Jacobsen
Postboks 218
FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tel +298 35 55 55
Fax +298 35 55 50

UNITED seafood "Fish products from pristine waters"

REPROZ